FISKIMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Fisheries and Maritime Affairs



# Við tær fer einki í fisk

## KT-leiðari til Fiskimálaráðið

Fiskimálaráðið søkir eftir KT-leiðara, sum hevur viljan og evnini at tryggja, at mál ráðsins fyri KT-nýtslu og kunningartrygd verða rokkin.

***Arbeiðsøkið***
Fiskimálaráðið bjóðar tær eitt mennandi arbeiðsumhvørvi, har vit leggja stóran dent á at seta okkum greið mál og at røkka teimum í felag.

***Ráðið***
hevur til samans upp ímóti 200 starvsfólk og fleiri KT-serskipanir, og nógvar spennandi verkætlanir og uppgávur bíða tær. Arbeiðsøki títt verður millum annað at:

- tryggja, at raksturin og trygdin á stóra KT-kervi okkara eru í lagi, millum annað við at gera avtalur við privatu og almennu veitarar okkara
- tryggja, at innsavnaðu upplýsingar okkara um fiskiríkidømi Føroya verða viðgjørdar trygt og rætt, og at sum mest fæst burtur úr teimum
- samskipa KT-nýtsluna hjá aðalráðnum og øllum stovnum undir tí, t.d. Tilbúgvingarstovninum, Skipaeftirlitinum, Fiskiveiðieftirlitinum, Lønjavningarstovuni og Skipaskrá seting Føroya.
- taka støðu til at innlima KT-kervi okkara í Landsnet.

***Førleikar***
Tú hevur viðkomandi KT-útbúgving og royndir á økinum og dugir at síggja KT-nýtslu í einum størri samanhangi. Somuleiðis er umráðandi, at tú ert ein góður fyriskipari, og at tú dugir væl at samstarva og sparra við bæði veitarar og viðskiftafólk.

***Umsóknir og setanartreytir***
Løn- og setanartreytir eru sambært avtalu millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið er Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovan. Tænastustaðið er í løtuni aðalskrivstovan, við beinleiðis tilvísing til aðalstjóran.

Umsóknir við avritum av prógvum og týðandi skjølum skulu vera Fiskimálaráðnum í hendi í seinasta lagi 8. januar 2008. Send umsókn við vanligum brævi til Fiskimálaráðið, Postboks 347, FO-110 Tórshavn ella við teldubrævi til fisk@fisk.fo.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hera Joensen, deildarleiðara, tlf. 353212.
Sí eisini heimasíðu okkara, ***www.fisk.fo***

*Fiskimálaráðið er eitt av sjey stjórnarráðum í miðfyrisitingini, sum veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum umsitur málsøkini fiskivinna, sjóvinna og tilbúgving. Fiskimálaráðið vegleiðir landsstýrismannin, soleiðis at avgerðirnar eru rættar og haldgóðar. Ráðið fyrireikar lógir, kunngerðir og reglugerðir, og hevur eisini eftirlit við, at ásettar reglur verða fylgdar. Somuleiðis røkir ráðið samskipandi uppgávur innan málsøkið hjá landsstýrismanninum, og tekur lut í millumlanda samráðingum, altjóða fiskiveiði- og sjóvinnufelagsskapum umframt norðurlendskum samstarvi.*

*Vit draga eina línu*
*Vit seta skynsemi í hásæti*
*Vit vilja vita*
*Vit bróta slóð*

SENDISTOVAN





